# 350 ungdómar á legu í Giljanesi

**Í vikuskiftinum skipaði HeimaMissiónsUngdómur (HMU) fyri LandsUngdómsStevnu (LUS) á Giljanesi. 350 fólk vóru samlað í skúlanum á Giljanesi**

LUS
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

11.-14. mai var ungdómslegan LUS á Giljanesi. HMU hevur hesa leguna annað hvørt ár. Fyri tveimum árum síðani var legan í Havn, og nú skuldi hon aftur verða á Giljanesi, har hon eisini var í 1998.

Undirtøkan fyri leguni var sera góð. Tað var fult teknað tríggjar vikur áðrenn legan byrjaði. Har vóru ungdómar frá 16 ár upp til seint í tjúgunum. Á skránni vóru bíbliutímar, møtir, lovsangs- og vitniløtur, kirkjugongd og ikki minst hugnalig samvera. Legan byrjaði hóskvøldið, har ið luttakarnir fingu at eta og vórðu samansjóðaðir.

Um kvøldið var møti. Til øll møtini sang ein lovsangsbólkur kallaður LUS-Worshipband til felagssangin. Hesin bólkurin var mannaður við nøkrum av teimum bestu sangarunum og tónleikarunum innan Heimamissiónina. Sangurin gekk sera væl við fjølbroyttum sangum. Heilt frá nýggjum enskum sangum til gamlar endurtulkaðar sálmar.




### Tummasarmessa

Fríggjadagin vóru áhugatímar á skránni. Millum evnini sum kundu veljast vóru dreingja- og gentuhornið, kristin um 10 ár?, Guds ætlan við mær og LUS-kórið. Um kvøldið var kirkjugongd í Sandavágs kirkju. Henda kirkjugongd var eitt sindur ørðvísi enn tær, sum vit vanliga eru til hvønn sunnudag. Hans Eiler Hammer hevði gudstænastuna, sum verður kallað fyri Tummasarmessa. Tummasarmessan byrjaði í Norra, og var hon hildin serliga fyri tey ivandi, og av tí sama hevur hon fingið navnið Tummasarmessa. Í Føroyum varð hendan messan fyrstu ferð roynd í Christianskirkjuni í Klaksvík á LUS ár 2000, og var hon sera væl dámd. Tá var tað eisini Hans Eiler, sum hevði gudstænastuna

Trummur, guitari, ljómborð og bassur spældu undir til sangin í kirkjuni. Tekstsurin varð varpaður upp á veggin við einari uppvørpu. Sungnir vóru bæði lívligir og friðaligir ungdómssangir. Á gólvinum vóru borð við fýrfatsljósum, sum ímyndaðu ein kross. Meðan sungið varð, var møguleiki at fara fram til forbøn og at tendra eitt ljós á gólvinum og biðja eina bøn. Eftir sangløtuna fóru fólk fram til altars til breyðbróting.

Gudstænastan vardi í samfullar 3 tímar. Løtan var sera góð og innilig fyri tey luttakandi. Sera nógv nýttu møguleikan at fara fram til forbøn.

### Kvøldsetir

Øll kvøldini endaðu við einari kvøldsetu, har ið dagurin varð vístur í myndum. Fríggjakvøldið framførdi LUS-kórið. Tað ljóðaði sera

## Agnar Falkvard Joensen


*- Tað er fínasta slag, at LUS flytir millum ymisk støð, heldur Agnar*

16 ár
Sandavágur

*Hvussu dámdi tær LUS?*

Mær dámdi sera væl. Hetta er næstu ferð, at eg eri á LUS, og eg eri glaður fyri, at tað er á Giljanesi, tí at tað er so nær við mítt heim. Tað er fínasta slag, at LUS flyttir millum ymisk støð hvørjaferð, tí at so kunnu øll kenna seg at eiga ein part í tí.

*Hvat hevur tú persónliga fingið burturúr?*

Eg eri heilt vist vorðin andaliga styrktur. Bíbliutímarnir og felagsskapurin var sera góður. Hetta hevur givið okkum møguleika at tryggja okkara framtíð, sum heiti fyri LUS eisini var hesa ferð.

*Hevur tú fingið nógvar nýggjar vinir her?*

Ja, eg havi møtt nógvum nýggjum fólkum, men serliga eru tey vinabond, sum eg longu hevði áðrenn leguna, vorðin styrkt.

**HK**


*Fríløtur vóru eisini, har høvi var at stuttleika sær*



*Møtini vóru hildin í høllini í skúlanum á Giljanesi*